Miðalaldurin var 22,54

Í Klaksvík eru tey errin av ungu klaksvíkingunum, sum í gjár stríddu seg til eitt stig á heimavølli móti Víkingi. Og tað er ikki nakað roynt lið, sum Alexandar Djordjevic og Jákup Mikkelsen, venjararar hjá KÍ, hava undir hond. Miðalaldurin hjá teimum fyrstu ellivu í gjár var 22,54 ár. Har millum vóru 38 ára gamli Jákup Mikkelsen og 31 ára gamli Heðin á Lakjuni. Innskiftararnir vóru tó væl eldri. Allan Joensen, 35 ár, Leon Bjartalíð, 28 ár, og Tórður Lervig, 23 ár, vóru innskiftir í seinna hálvleiki.

Claus fekk javnleik

Claus Bech Jørgensen var settur á vøllin seinastu tríggjar minuttirnar, tá ið Blackpool spældi á heimavølli ímóti Reading leygardagin. Blackpool spælir í næstbestu deildini, og dysturin ímóti Reading endaði við javnleiki 2-2. Reading legði seg á odda 2-0 í fyrra hálvleiki. Blackpool minkaði fyri hálvleikssteðgin og tryggjaði sær javnleik við máli eftir 66 minuttir.

KÍ-Víkingur 2-2 (1-0):

Kenslurnar ráða í Klaksvík

KÍ

Víkingur

Í Klaksvík leggja tey ikki stóran dent á fótbóltsspælið. Áskoðararnir elska at síggja leikararnar stríðast, og tað gav í gjár eitt stig, tá Víkingur vitjaði við Injector Arena

FÓTBÓLTUR

Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo

Unglingarnir hjá KÍ eru í ferð við at gerast menn. Hesa ferð stríddi KÍ seg upp á javnt, hóast Víkingur við tveimum tøttum málum hevði skotið seg á sigurskós

Mynd: Álvur Haraldsen

Tað var ikki flott. Lítið tekniskt undirhald. Fáir møguleikar. Men tað var stríðst. Tað var runnið og runnið. Tað var takklað ígjøgnum. Alt var givið í nærdystunum. Og tað gav úrslit til seinast.

Tórður Lervig kundi væl verði einasta hetjan í Klaksvík í gjár. Innskifti framherjin tryggjaði KÍ eina stigi við Injector Arena, tá hann í tíðini dómarin hevði lagt afturat, sendi framvið Geza Turi. Bólturin endaði fyri føturnar á Lervig eftir frísparksinnlegg.

Men hann var ikki hetjan – men ein av hetjunum. Klaksvíkingar fagnaðu í gjár øllum sínum hetjum, sum framvegis eru ósigraðir í Vodafonedeildini. Tað var stríðst og strevast fyri felagið, og tað tykjast áskoðarnir í Klaksvík at elska.

Imponerandi

KÍ hevði lítið skipað spæl. Í løtum fluttu John Hammer og Eli Simonsen, sum vóru á miðvøllinum saman við Erlandi B. Danielsen, bóltin væl, men fáu royndirnar í tílíkum dystum høvdu eisini mistøk við sær. Men talan er um leikarar, sum framvegis eru í læru, og við tí í huga, royndust teir sera væl. Teirra partur lá í øllum førum ikki eftir.

Serliga var stríðshugurin hjá heimaliðnum imponerandi. Hóast tað oftast gekk illa at fáa ferð á bóltin, góvust teir ongantíð at stríðast. Ungu klaksvíkingarnir tykjast væl fyri kropsliga, og tað hevur stóran týdning, tá lítið eydnast við bóltinum.

Heimaliðið legði væl fyri, og longu eftir átta minuttum kundu KÍ-fjeppararnir reisast fyri fyrstu ferð. Unglingaspælarin Ivan Joensen var runnin afturum Hanus Jacobsen, sum var vinstri vongverji hjá Víkingi, tá Kristoffur Jakobsen gav honum bóltin í føturnar. Joensen slapp inn í brotsteigin, áðrenn hann við vinstra beininum sendi í netið.

Víkingur kann bjóða av

Jógvan Martin Olsen, venjari hjá Víkingi, hevði aftur í gjár Andrias Lava Olsen sum einsamallan framherja við stuðli frá Bárði Hansen, Magnusi Skoralíð og Súna Olsen. Og tað vísir seg, at Lava Olsen stórtrívist í leiklutinum.

Í stórum løtum av dystinum spældi Víkingur nógv við langum bóltum. Og hóast hann støðugt var trýstur av Oddmari á Lakjuni og Jógvani Isaksen í KÍ-miðverjuni, vann Andrias Lava Olsen flestu luftdystirnar. Millum annað í málinum hjá Finnuri Justinussen, tá landsliðsleikarin við høvdinum stýrdi bóltinum fyri føturnar á innskiftaranum, sum av brotsteigarmarkinum smekkaði í netið. Við sínum skjótleika og gjøgnumbrotsstyrki var hann allatíð ein hóttan móti klaksvíkingunum.

Víkingur hevði í gjár torført við at spæla seg til upplagdar møguleikar. Oftast var loysnin at sparka bóltin til Andrias Lava Olsen, sum síðan var rættiliga einsamallur. Súni Olsen varð ongantíð av álvara eyðsýndur, uttan tá hann javnaði fyri gestirnar á tímanum. Landsliðsleikarin var fyrstur á bóltinum, sum Jákup Mikkelsen noyddist at sleppa fyri føturnar á honum. Málverjin helt ikki kúluni, sum Magnus Skoralíð við høvdinum hevði stýrt móti málinum.

Við lyklaleikarum sum Andrias Lava Olsen, Súna Olsen og Sølva Vatnhamar, kann Víkingur væl gerast ein av avbjóðarum til FM-heitið. Hópurin er breiður, og tað sást aftur, at ungu Finnur Justinussen og Bárður Hansen – sum ikki vóru við í steypadystinum móti MB – royndust væl.

At skjóta tvey mál í Klaksvík er nøktandi, hóast tey kundu verði fleiri. Millum annað bjargaði Ivan Joensen á strikuni, tá lítil løta restaði í av fyrra hálvleiki. Men verjuparturin er nakað, sum Jógvan Martin Olsen, venjari, noyðist at hugsa um komandi vikuna. Avrikið í gjár var samanumtikið ikki nøktandi, men flestu liðini hava vanliga trupulleikar í Klaksvíkar. Men tílíkir dystir skulu vinnast. Serliga um Víkingur ætlar sær gull.

Sagt í 3. hálvleiki

Ein partur av sendingini, 3. hálvleikur, sum Rás2 borðreiðir afturvið Vodafone-deildini, eru SMS-viðmerkingar frá lurtarunum. Niðanfyri prenta vit nakrar av teimum mongu viðmerkingunum, sum vórðu sendar inn á 559999 sunnudagin. Tað ovast nevnda vórðu hesa ferð kosin at vera tey bestu, og fáa skrivararnir eitt útvarpstól frá Vøruhúsinum á Hjalla sendandi fyrsta dagin.

»Úrslitið av dagsins dystum er, so sum liðini eru, óansæð hvat tey eita. «
»Rulla páskaregg, rulla páskaregg! HB "spælir gekk" rullar vekk, fingu bæði í posa & sekk; men gakk av stað, vit høvdu ikki okkara dag - fingu snøgt sgt ov lítið í lag!
Vh,
EB/Streymslit. «

»Hvussu nógvar B36arar tekur tad at skrùva eina peru ùr? Ongan! Fuglafirdingar skulu nokk gera tað fyri teir. Rúni dømdi annars óføra væl ì dag.«

»Eftir dystin mòt B68 ì dag,er tad ikki AB, men Argir menn.:-D«

»Eb-streymur tapti i dag. Eru Desperat Housevifes so púra desperatar i dag?«

»Nu vilja fuglfirdingar vera við, at b36'arar eru líka kraddutir sum gøtumenn:-) «

»Vìkingur manglar 32 kort til sjavs,stikk den«

»Hugnaligt at syggja so nògvar vìkingar gràta ì dag! òdin og thor nakad stoltir!«

»Tit spyrja um hvønn leist teir brùka- kanska brùka skòleist ?«

»Um man kann hoyra morgunlestur ì hasum radio'num, Ja, so vil eg vinna ta «

»Reytt sum blóð, svart sum Ibenholtog lør sum snjòð,B68 jóv jóv. «

»Lýsing: mál verða latin hægstbjoðandi,heilsan b36 «

»HB vann, ti venjarin hevur hugt at EB-Streymtalvuni.«

»At hyggja at ìF ì 2. hàlvleiki var sum at sita à kummuni vid krampa ì kokubotninum: Tryst, tryst og tryst, men einki kemur burturùr.«